LM-099/2023

Kvgrskjal 56

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn, 23. februar 2024

Privat hoyringarsvar til Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

Árini frá 1987 til 2002 búði eg í Noregi. Fyrstu 9 árini búði eg í Tromsø, millum annað meðan eg nam hægri lestur. Eg giftist norskum manni, og vit fingu børn saman. Í 1996 flutti eg við familjuni til Åfjord, sum er ein bygd, á Fosen-hálvoynni norðan fyri Trondheim. Vit keyptu ein bóndagarð, og nøkur ár høvdu vit mjólkineyt og kjøtframleiðslu við útigangandi neytum av blandingsrasu á garðinum.

Mær hevur altíð dámt væl at komið út í náttúruna, bæði í Føroyum og í Noregi, og alramannarætturin, sum hevur verið lógarásettur í Noregi síðani 1957, tiltalar meg. Norðmenn eru eitt fólk, ið virðismeta náttúru og frítíðarlív sera høgt, og tey hava eitt virkið frítíðarlív í náttúruni bæði summar og vetur. Eg haldi, at vit føroyingar hava nógv at læra av teimum.

Norski alramannarætturin er m.a. staðfestur í frítíðarlóg. Tá norska frítíðarlógin av fyrstan tíð bleiv samtykt, vóru tað ikki øll, ið tóku undir við henni. Summastaðni vóru ósemjur og klandur millum ymisk áhugamál, men við tíðini er hetta broytt. Norðmenn hava yvirhøvur tikið alramannarættin til sín og rokna hann sum ein part av teirra mentanararvi. Tey 15 árini eg búði í Noregi, hoyrdi eg ongantíð eitt øvugt orð um alramannarættin, og hesin rættur var meiri at rokna sum sjálvfylgja, sum partur av teirra fólkasál.

Seinnu árini hevur norska tjóðartingið (Stortinget) endurskoðað lógina um frítíðarliv, og ísv við hetta eru frágreiðingar gjørdar, sokallaðar "Stortingsmeldinger". Frágreiðingarnar verða gjørdar sum grundarlag fyri umrøðu í tjóðartinginum, eitt nú tá tingið skal meta um, hvørt lógarbroytingar skulu gerast á einum øki, ella nýggjar lógir setast í verk.

St.meld. 18 (2015–2016) hevur heitið "Friluftsliv — Natur som kilde til helse og livskvalitet".

Innleiðandi verður skrivað soleiðis um "Friluftslivets egenart" í hesi frágreiðing (á s. 10):

Friluftsliv er en viktig del av den norske nasjonale identiteten og den norske kulturarven. Friluftsliv har en dokumentert helseeffekt og er en viktig faktor for befolkningens livskvalitet. Friluftsliv er også en sentral del av den personlige identiteten for svært mange mennesker. Kombinasjonen fysisk aktivitet og naturopplevelse er unik, og utgjør kjernen i friluftsliv, ofte i et samspill med kulturminner. Friluftsliv gir både sanselige og fysiske opplevelser. I tillegg vil et aktivt friluftsliv kunne gi den enkelte et forhold til naturen, som igjen kan medføre økt vilje til å foreta miljøvennlige valg. Stortingsmeldingen skal bidra til å opprettholde friluftsliv som en levende del av den norske kulturarven og nasjonale identiteten, og videreutvikle friluftsliv som del av arbeidet for å styrke folkehelsen.

Tær dagføringar, ið hava verið av frítíðarlógini í Norra, hava allar víðkað um rættindini, ið almeningurin hevur til at ferðast og uppihalda sær í náttúruni. Í brotinum heryvir, verður grundgivið fyri, hví frítíðarlív stendur so høgt í metum hjá politisku skipanini. Hetta er millum annað tí, at frítíðarlívið verður mett at vera grundleggjandi fyri norska samleikan og mentanararvin, at gransking vísir, at eitt virkið frítíðarlív er gott fyri kropsligu og sálarligu fólkaheilsuna, og at eitt virkið útilív gevur lívsgóðsku og mennir sambandið millum menniskju og náttúru, sum leiðir til, at fólk ynskja at verja náttúru og umhvørvi.

Sambært síðu hjá norsku ríkisstjórnini verður alramannarætturin skilmarkaður soleiðis[1]

Allemannsretten er grunnlaget for friluftslivet i Norge, og brukes gjerne som en samlebetegnelse på rettigheter vi har til fri bruk av naturen. Den gir blant annet rett til fri ferdsel til fots og på ski i utmark.

De viktigste reglene om allemannsretten følger av friluftsloven. Allemannsretten gjelder uavhengig av hvem som er grunneier... Retten består av rett til opphold, blant annet telting, bading og rasting, ferdsel og høsting. Bruk av allemannsretten er gratis.

Allemannsretten gir ikke bare rettigheter, det følger også plikter. Når du benytter deg av allemannsretten, skal du opptre hensynsfullt og varsomt.

Opphold, ferdsel og høsting må skje på en hensynsfull måte. Man må ta hensyn til andre som er ute i naturen, fastboende, hyttebeboere og landbruket, som har sin næring i naturen.

Ásetingarnar í § 3 í Ferðavinnulógini snúgva seg um gongurætt í náttúruni fyri "ein og hvønn" saman við skyldum at hava fyrilit og fara væl um sambært § 4. Lógaásetingarnar í §§ 3 og 4 líkjast ásetingunum í norsku lógini um útilív (Fritidsloven). Tí taki eg fult undir við lógini og havi góðar vónir um, at føroyingar loksins fáa lógarásettan rætt til frítt og við skyldum at uppihalda sær og ferðast í náttúruni. Tað er nevniliga ikki gott, tá lógir og fyriskipanir eru ógreiðar, soleiðis sum vit, sum ferðast í náttúruni, hava upplivað og merkt á okkara kroppi, serliga seinastu árini, ið ferðavinnan hevur vundið uppá seg. Tá áliggur tað mynduleikunum at lógaráseta og skipa økið, soleiðis at øll áhugamál verða vigað og fáa pláss í náttúruni, uttan at tað gongur ov nógv út yvir náttúru, gongurætt ella virksemi í náttúruni.

Eg taki undir við serligu ásetingunum í ferðavinnulógini, sum skulu skipa ferðavinnuna, **um so er, at ásetingarnar ikki gera seg inn á alramannarættin, ið er staðfestur í §§ 3 og 4**. Í so fall, haldi eg at ferðavinnulógin er ein góð lóg, ið kann hjálpa at stýra og skipa ferðavinnuna, soleiðis at hon ikki órógvar óneyðugt okkara náttúru, mentan, landbúnaðarvirksemi, ítriv og annað virksemi í náttúruni.

Mín persónliga ferð í haganum, serliga frá 2011, tá eg miðvíst byrjaði at ganga niðan á fjallatindar, hevur givið mær so nógv og ment meg persónliga. Ítrivið hevur givið mær ein sunnan felagsskap, ment persónligar relatiónir og kroppsligu og sárlarligu heilsuna. Harumframt kenni eg eisini betri okkara land, og havi fingið styrkt bandið og alskin til og fingið eitt sterkt ynski um at verja okkara náttúru og land. Ikki so ólíkt tí, ið víst verður á í norsku stortingsmeldingini sum sereyðkenni fyri virkið frítíðarlív.

Vinaliga

Rúna Hjelm,

Suðuroyavegur 16, 100 Tórshavn

[1] https://www.regjeringen.no/no/tema/klima-og-miljo/friluftsliv/innsiktsartikler-friluftsliv/allemannsretten/id2076300/